# Fólkanøvn í Eysturoyar sýslu 1801

*Eftir Jákup í Jákupsstovu.*

Henda fimta grein um fólkanøvn í Føroyum 1801 viðger fólkanøvnini í Eysturoyar sýslu. Hinar fyrru greinirnar stóðu í 14., 15., 16. og 17. bók av Fróðskaparriti og viðgjørdu fólkanøvnini ávikavist í Suðuroyar sýslu, Sandoyar sýslu, Vága sýslu og í Streymoyar sýslu.

Í teimum fýra sýslunum búðu í 1801 tilsamans 3.406 fólk, nevniliga

| | | |
|---|---|---|
| í Suðuroyar sýslu ..................... | 781 | fólk |
| í Sandoyar sýslu ..................... | 466 | — |
| í Vága sýslu ..................... | 482 | — |
| í Streymoyar sýslu ..................... | 1.677 | — |
| | 3.406 | fólk |
| Í Eysturoyar sýslu búðu .............. | 1.214 | — |
| og eru við hesum higartil kannað nøvn á | 4.620 | fólkum |
| av landsins íbúgvatali 1801 tilsamans | 5.265 | — |
| Tey írestandi | 645 | fólk |

verða at finna í Norðoya sýslu, og fyrr enn eisini tey eru kannað, verður ikki roynt at gera støðuna upp, »t. d. hvussu nær tey norrønu nøvnini vóru við at hvørva, og hvørji tey nøvn vóru, ið trokaðu hesi burtur, hvussu mong ið tey vóru og hvussu útbreidd«, soleiðis sum setningurin varð settur longu í fyrstu grein. (Fróðskaparrit 1965).

Møguligir lesarar mugu tí hava tol enn eitt ár, og hevur onkur upplýsingar, ið kunnu vera av týdningi fyri greinargerðina, sum løgd verður fram, tá ið øll nøvnini eru kannað, er høvundurin takksamur fyri alla vegleiðing.

Enn eru ikki onnur heimildarrit nýtt uttan sjálvur manntalslistin, og har eru bygdirnar í Eysturoy soleiðis taldar og fólkið í teimum:

| | | Personer | |
|---|---|---|---|
| Eydes Sogn | | | |
| Eyde | | 122 | |
| Øregaard | | 19 | |
| Nord-Schaale | | 24 | |
| Tilsammen i Eydes Sogn | | —— | 165 |
| Fundings Sogn | | | |
| Funding | | 58 | |
| Giov | | 78 | |
| Tilsammen i Fundings Sogn | | —— | 136 |
| Siov Sogn | | | |
| Siov | | 36 | |
| Seblende | | 29 | |
| Gierdum | | 35 | |
| Görum | | 6 | |
| Zelletræ | | 51 | |
| Schaale | | 66 | |
| Tilsammen i Siov Sogn | | —— | 223 |
| Næss Sogn | | | |
| Næs | | 22 | |
| Torchildshöy | | 19 | |
| Tofte | | 60 | |
| Glibre | | 38 | |
| Solmunde | | 31 | |
| Lamhauge | | 22 | |
| Tilsammen i Næss Sogn | | —— | 192 |
| Norder-Göte Sogn | | | |
| Norder-Göte | | 68 | |
| Giov | 8 | | |
| Syder-Gøte | 75 | 83 | |
| Tilsammen i Norder-Göte Sogn | | —— | 151 |

| | | Personer | |
|---|---|---|---|
| Fuglefiord Sogn | | | |
| | Fuglefiord | 128 | |
| | Leerviig | 85 | |
| | Tilsammen i Fuglefiord Sogn | —— | 213 |
| Aandefiord Sogn | | | |
| | Aandefiord | 75 | |
| | Eldewig | 59 | |
| | Tilsammen i Aandefiord Sogn | —— | 134 |
| | | | 1214 |

## *Eiði*

Tilsamans 30 húski, 122 fólk.

*Kvinnur:*

4 Anna
3 Anna Katrina
1 Anna Lisbeth
2 Anna Malene
1 Bille
1 Birgithe
4 Elsebeth
1 Elsebeth Sophie
1 Femia
1 Gurendt Christine
1 Inger Anna
1 Johanne
5 Katrina
1 Katrina Malene
1 Kirstine
2 Magga
11 Malene
7 Maren
1 Maria
2 Sigga
1 Sophia
1 Sophia Fridericha
4 Sunneva
7 Susanna
1 Zidsel

65 kvinnur á Eiði 1801

*Menn:*

1 Anders
1 Berendt
1 Christian
2 David
1 Dione
1 Elias
1 Erich
3 Gregers
8 Hans
2 Heine
3 Jacob
1 Johan
3 Johannes
10 John
1 Knud
1 Magnus
1 Michel
1 Niels
8 Ole
1 Peder
6 Poul

57 menn á Eiði 1801

## *Norðskáli*

Tilsamans 4 húski, 24 fólk.

*Kvinnur:*

2 Anna
1 Anna Katrina
1 Anna Sopia
3 Elsebeth
1 Katrine
1 Malene
2 Maren
1 Susanne

12 kvinnur við Norðskála 1801

*Menn:*

1 Christian
1 Daniel
3 Isak
4 Jacob
1 Johannes
1 John
1 Peder

12 menn við Norðskála 1801

## *Oyri*

Tilsamans 2 húski, 19 fólk.

*Kvinnur:*

1 Anna Katrina Susanna
1 Anna Maria
1 Birgithe
1 Elsebeth
1 Elsebeth Helena
1 Kathrine
1 Katrine Elsebeth
1 Rachel
1 Sunneva
1 Susanne

10 kvinnur á Oyri 1801

*Menn:*

1 Hans
2 John
1 Ole
2 Peder
3 Povl

9 menn á Oyri 1801

## *Funningur*

Tilsamans 14 húski, 58 fólk.

| *Kvinnur:* | *Menn:* |
|---|---|
| 1 Anna | 1 Abraham |
| 2 Anna Lisbeth | 2 Andras |
| 1 Anna Sophia | 2 Isak |
| 2 Birgithe | 4 Jacob |
| 3 Elsebeth | 5 Johannes |
| 1 Johanne | 4 John |
| 1 Katrina | 1 Ole |
| 3 Lisbeth | 3 Peder |
| 1 Magga | 4 Povl |
| 4 Malene | 3 Thomas |
| 2 Maren | 1 Torle |
| 1 Sidsel | 30 menn í Funningi 1801 |
| 1 Sigga Sophia | |
| 2 Sonova | |
| 2 Susanna | |
| 1 Susanna Malena | |
| 28 kvinnur í Funningi 1801 | |

## *Gjógv*

Tilsamans 18 húski, 78 fólk.

*Kvinnur:*

4 Anna
1 Anna Katrina
1 Barba
1 Birgithe
1 Elisabeth Katrina
1 Elisabeth Maria
1 Elsebeth
1 Elsebeth Katrine
1 Elsebeth Malene
1 Elsebeth Maria
1 Inger
3 Katrine
3 Malene
5 Maren
1 Maren Sophia
1 Sigga
1 Sophie
3 Sunneva
2 Susanna

33 kvinnur við Gjógv 1801

*Menn:*

1 Anders
2 Andres
2 Christian
1 Daniel
5 Hans
1 Heyne
6 Jacob
4 Johannes
8 John
1 John Christian
1 Nicolai
8 Ole
1 Ole Jacob
2 Peder
1 Poul
1 Rasmus

45 menn við Gjógv 1801

## *Selatrað*

Tilsamans 10 húski, 51 fólk.

*Kvinnur:*

5 Anna
1 Anna Elisabeth
4 Anna Katrine
1 Anna Melene
1 Anna Margrethe
2 Anna Sophia
1 Christiana Sophia
1 Helena
1 Johanna
1 Juliana
1 Katrine Malene
2 Maren
1 Sophia
1 Sophia Katrine
1 Sunneva
5 Susanna

29 kvinnur á Selatrað 1801

*Menn:*

2 Anders
1 Christen
1 Clemend
5 Jacob
6 John
1 Michel
1 Niclas
1 Ole Jacob
2 Peder
1 Poul
1 Sacharias

22 menn á Selatrað 1801

## *Gerðar*

Tilsamans 8 húski, 35 fólk.

*Kvinnur:*

1 Ada Susanna
1 Anna
1 Anna Sophia
1 Barba
2 Elsebeth
1 Ingeborg
2 Katrine
1 Magge
2 Maren
1 Sara Maria
1 Sonneva
1 Susanna

15 kvinnur í Gerðum 1801

*Menn:*

1 Abraham
1 Anders
2 Augustinus
1 Berendt
2 Bertel
1 Frederich
7 John
1 Magnus
1 Peder
1 Poul
1 Simon
1 Thomas

20 menn í Gerðum 1801

## *Sevlendi*

Tilsamans 8 húski, 29 fólk.

*Kvinnur:*

3 Anna
1 Anna Lisbeth
1 Anna Maria
2 Elsebeth
1 Elsebeth Sophia
3 Lisbeth
1 Maren
1 Sigge
1 Sophia
1 Susanna

15 kvinnur í Sevlendi 1801

*Menn:*

1 Anders
1 Berendt
1 Hans
3 John
1 Niclas
1 Ole
2 Peder
1 Rasmus
1 Samuel
1 Simon
1 Trond

14 menn í Sevlendi 1801

## *Garðar*

Tilsamans 2 húski, 6 fólk.

*Kvinnur:*

1 Anna
1 Elsebeth
1 Maren

3 kvinnur í Gørðum 1801

*Menn:*

1 Anders
1 Hans
1 Jacob

3 menn í Gørðum 1801

## *Við Sjógv*

Tilsamans 8 húski, 36 fólk.

*Kvinnur:*

1 Anna
1 Anna Lisbeth
1 Bille
1 Bille Katrine
1 Katrine
1 Lisbeth
3 Malene
1 Maren
2 Maria
1 Maria Kirstine
1 Sonneva
1 Sophia
2 Susanna
1 Zigge

18 kvinnur við Sjógv 1801

*Menn:*

1 Anders
1 Guttorm
1 Johan
1 Johannes
3 John
1 Michel
2 Peder
3 Poul
3 Rasmus
2 Thomas

18 menn við Sjógv 1801

## *Skáli*

Tilsamans 14 húski, 66 fólk.

*Kvinnur:*

1 Agnesse
2 Anna
1 Anna Lisbeth
1 Birgithe
1 Christiane
1 Christine
4 Elsebeth
1 Elsebeth Maria
1 Juliana
3 Katrine
1 Kirstine Sophia
1 Kristine
2 Lisbeth
3 Maren
2 Mariane
1 Sidsel
1 Sunneva
2 Susanna
1 Zidsel

30 kvinnur á Skála 1801

*Menn:*

2 Abraham
1 Antonius
1 Christian
1 Daniel
2 Hans
1 Hans-Poul
1 Jacob
1 Johan
7 John
3 Magnus
4 Niclas
1 Nicolai
2 Niels
4 Ole
1 Peder
2 Poul
1 Rasmus
1 Thomas

36 menn á Skála 1801

## *Søldarfjørður*

Tilsamans 5 húski, 31 fólk.

*Kvinnur:*

1 Anna
1 Anna Kirstine
1 Anna Margrethe
1 Birgithe
1 Ellen
2 Else
2 Elsebeth
1 Elsebeth Maria
1 Hendriche Christiane
1 Karen
2 Katrine
2 Maren

16 kvinnur í Søldarfirði 1801

*Menn:*

1 Hans
1 Hans Peder
1 Jacob
1 Johan Hendrich
1 Johannes
3 John
2 Ole
1 Peder
1 Rasmus
2 Samuel Jacob
1 Søren

15 menn í Søldarfirði 1801

## *Lambi*

Tilsamans 2 húski, 22 fólk.

| *Kvinnur:* | *Menn:* |
|---|---|
| 2 Anna | 1 Antonius |
| 1 Anna Katrine | 1 Clemend |
| 1 Birgithe | 1 Haldan |
| 1 Ellen | 1 Hans |
| 1 Ellen Katrine | 1 Jens |
| 1 Else | 1 Johannes |
| 1 Karen Margrethe | 1 John |
| 3 Malene | 1 Samuel Jacob |
| 2 Maren | 1 Thomas |
| 13 kvinnur í Lamba 1801 | 9 menn í Lamba 1801 |

## *Glyvrar*

Tilsamans 5 húski, 38 fólk.

| *Kvinnur:* | *Menn:* |
|---|---|
| 2 Anna | 1 Christen |
| 1 Anna Sophia | 1 Christian |
| 2 Birgithe | 1 Claus |
| 1 Christiana | 1 Hans |
| 2 Ellen | 4 Jacob |
| 1 Elsebeth Malena | 1 Jens |
| 2 Johanna | 1 Johannes |
| 2 Katrine | 2 John |
| 1 Malene | 2 Niels |
| 1 Maren | 3 Peder |
| 1 Rachel | 1 Rasmus |
| 1 Sophia Christiana | 1 Simon |
| 2 Susanna | 19 menn á Glyvrum 1801 |
| 19 kvinnur á Glyvrum 1801 | |

## *Toftir*

Tilsamans 11 húski, 60 fólk.

*Kvinnur:*

2 Anna
1 Anna Kirstine
1 Anna Margrethe
1 Anna Sophia
1 Bille
1 Christine
1 Ellen
1 Ellen Katrine
3 Ellen Maria
2 Elsebeth
1 Elsebeth Malene
1 Johanna Maria
1 Julianna
1 Katrine
3 Lisbeth
3 Malene
1 Maren
1 Rachel
1 Sara
1 Sara Maria
1 Sophia
2 Susanna

31 kvinnur á Toftum 1801

*Menn:*

1 Christian
1 Daniel
2 Hans
2 Jacob
1 Jens
2 Johannes
5 John
1 Justinus
1 Lyder
1 Magnus
1 Michel
1 Morten
1 Niclas
3 Ole
1 Ole Christian
3 Sigvardt
1 Søren
1 Thomas Peder

29 menn á Toftum 1801

## *Torkilsheyggjur*

Tilsamans 2 húski, 19 fólk.

*Kvinnur:*

1 Angelica Splid
1 Anna Sophia
1 Barba
1 Charlotta Margrethe Amalia
1 Christine Maria
1 Juliane
1 Maria Magdalena
1 Rachel
1 Susanna

9 kvinnur á Torkilsheyggi 1801

*Menn:*

2 Andreas
1 Cornelius Christian
1 Hans
1 Johannes Olavius
3 John
1 Peder
1 Simon

10 menn á Torkilsheyggi 1801

## *Nes*

Tilsamans 3 húski, 22 fólk.

*Kvinnur:*

1 Anna Elisabeth
1 Anna Katrine
1 Anna Maria
1 Bille Katrine
1 Ellen
2 Elsebeth
1 Inger Katrine
1 Magga
1 Malene
1 Maria
1 Sunneva
1 Susanna Malene

13 kvinnur á Nesi 1801

*Menn:*

2 Jacob
1 Johan Christian
1 Johannes
3 John
1 Magnus
1 Ole Hans

9 menn á Nesi 1801

## *Syðrugøta*

Tilsamans 15 húski, 75 fólk.

*Kvinnur:*

1 Ada
8 Anna
1 Anna Sophia
2 Bille
1 Cirstine
12 Elsebeth
3 Malene
4 Maren
1 Rachel
1 Susanna

34 kvinnur í Syðrugøtu 1801

*Menn:*

1 Anders
1 Antonius
2 Elias
1 Eyden
2 Gregers
2 Hans
4 Hejne
1 Isak
5 Jacob
1 Johannes
7 John
3 Ole
3 Peder
6 Poul
1 Rasmus
1 Trond

41 menn í Syðrugøtu 1801

## *Gøtugjógv*

Tilsamans 1 húski, 8 fólk.

*Kvinnur:*

1 Anna Marthe
1 Anna Sophia
1 Elsebeth
1 Marthe

4 kvinnur við Gøtugjógv 1801

*Menn:*

1 Elias
1 Hans
1 Høgne
1 Oluf

4 menn við Gøtugjógv 1801

## *Norðragøta*

Tilsamans 16 húski, 68 fólk.

| *Kvinnur:* | | *Menn:* | |
|---|---|---|---|
| 5 | Anna | 1 | Anders |
| 1 | Anna Maria | 1 | Augustinus |
| 1 | Barba Maria | 1 | Daniel |
| 1 | Birgithe | 1 | Eyden |
| 4 | Elsebeth | 3 | Hejne |
| 1 | Elsebeth Margrethe | 1 | Isak |
| 1 | Inger | 5 | Jacob |
| 2 | Katrine | 1 | Johannes |
| 3 | Malene | 10 | John |
| 5 | Maren | 1 | Magnus |
| 1 | Maren Sophie | 1 | Michel |
| 2 | Sara | 3 | Ole |
| 1 | Sigge | 1 | Peder |
| 2 | Susanna | 2 | Poul |
| 2 | Zidsel | 1 | Sacharias |
| 1 | Zigge | 1 | Simon |
| | | 1 | Thomas |
| 33 | kvinnur í Norðragøtu 1801 | 35 | menn í Norðragøtu 1801 |

## *Leirvík*

Tilsamans 22 húski, 85 fólk.

| *Kvinnur:* | *Menn:* |
|---|---|
| 6 Anna | 1 Aarandt |
| 1 Anna Katrine | 3 Daniel |
| 3 Dorothea | 1 Elias |
| 5 Elsebeth | 1 Erich |
| 3 Julianna | 2 Gabriel |
| 7 Katrine | 1 Hans |
| 2 Magga | 1 Hejne |
| 3 Malene | 1 Høgne |
| 4 Maren | 1 Isak |
| 1 Ragnhild | 1 Jacob |
| 1 Sara | 4 Johannes |
| 5 Sunneva | 10 John |
| 4 Susanna | 1 Justi |
| 45 kvinnur í Leirvík 1801 | 3 Michel |
| | 4 Ole |
| | 1 Peder |
| | 1 Poul |
| | 1 Rasmus |
| | 1 Sigvardt |
| | 1 Simon |
| | 40 menn í Leirvík 1801 |

## *Fuglafjørður*

Tilsamans 24 húski, 128 fólk.

| *Kvinnur:* | *Menn:* |
|---|---|
| 9 Anna | 1 Daniel |
| 2 Anna Katrine | 4 Elias |
| 1 Anna Maria | 6 Hans |
| 1 Anna Sophia | 1 Hejne |
| 1 Birgithe Sophia | 1 Høgne |
| 1 Ellen Katrine | 2 Isak |
| 6 Elsebeth | 6 Jacob |
| 10 Katrine | 2 Jeremias |
| 2 Lisbeth | 7 Johannes |
| 2 Malene | 10 John |
| 9 Maren | 1 Lauritz |
| 1 Margrethe | 1 Lucas |
| 1 Rachel | 1 Magnus |
| 1 Sara Sophia | 2 Niclas |
| 3 Sigge | 6 Ole |
| 1 Sisillia | 2 Peder |
| 5 Sunneva | 3 Poul |
| 3 Susanna | 1 Sacharias |
| 1 Zidsel | 3 Sigvardt |
| 4 Zigge | 1 Simon |
| 64 kvinnur í Fuglafirði 1801 | 1 Thomas |
| | 2 Trond |
| | 64 menn í Fuglafirði 1801 |

## *Oyndarfjørður*

Tilsamans 13 húski, 75 fólk.

*Kvinnur:*

6 Anna
1 Anna Magrethe
1 Anna Sophie
1 Barbra
2 Christine
1 Dorthea
3 Elsebeth
8 Malene
2 Maren
1 Maren Christine
2 Sophie
1 Sunnova
2 Susanna

31 kvinnur í Oyndarfirði 1801

*Menn:*

1 Abraham
2 Agustinus
1 Andres
2 Antonius
2 Hans
1 Harald
3 Høgne
1 Isak
5 Jacob
1 Jacob Peder
10 John
1 Nicolaj Peder
6 Ole
4 Peder
2 Pouvl
1 Pouvl Andreas
1 Siver

44 menn í Oyndarfirði 1801

## *Elduvík*

Tilsamans 15 húski, 59 fólk.

*Kvinnur:*

6 Anna
1 Anna Lisbeth
1 Anna Sophie
1 Bille
1 Birgithe
1 Dorthea
1 Dorthea Sophie
2 Ellen
1 Ellen Sophie
1 Elsebeth
1 Katrine
1 Lisbeth
1 Magga
2 Malene
6 Maren
1 Margrethe
2 Rachel
1 Sigga Sophie
3 Sonneva
1 Susanna

35 kvinnur í Elduvík 1801

*Menn:*

1 Andres
5 Daniel
1 Elias
1 Hans
1 Hejne
2 Høgne
1 Johannes
1 Johannes Jeremias
6 John
1 Michel
1 Nicklas
1 Ole
1 Pouvl
1 Simon

24 menn í Elduvík 1801

### *Kvinnunøvn í Eysturoyar sýslu 1801*

1 *Ada* er 37 ára bóndakona í Syðrugøtu.

1 *Ada Susanna* er 8 ára bóndadóttir í Gerðum í Sjóvar sókn.

1 *Agnesse* er 63 ára haldbóndakona á Skála.

*Amalia* finst bara í samanseting Charlotta Margrethe A.

1 *Angelica* er 17 ára prestadóttir á Nesi.

71 *Anna* er vanligasta kvinnunavn í Eysturoy 1801. Umframt tær 71, ið hava A. sum einasta fornavn, eru 51, ið hava A. sum fremra navn av tveimum, ein hevur A. sum fremsta navn av trimum, og ein hevur A. sum seinna navn av tveimum fornøvnum.

2 *Anna Elisabeth* eru 14 ára abbadóttir uppsitarans á prestagarðinum á Nesi og ein 2 ára genta á Selatrað. Sí eisini A. Lisbeth.

14 *Anna Katrina* eru í øllum sóknum uttan Gøtu sókn og Oyndarfjarðar sókn. Aldur: 1—65 ár.

1 *Anna Katrina Susanna* er 16 ára bóndadóttir á Oyri.

2 *Anna Kirstine* eru 21 ára ógift arbeiðskona í Søldarfirði og 6 ára smágenta á Toftum.

7 *Anna Lisbeth* eru 33 ára bóndakona á Skála og 6 børn ymsastaðni, øll yngri enn 12 ár. Sí eisini A. Elisabeth.

3 *Anna Malena* eru tvær á Eiði og ein á Selatrað. Allar yngri enn 13 ár.

4 *Anna Margrethe.* Elstar eru 68 ára gomul genta í Oyndarfirði og 46 ára matmóðir á Selatrað. Í Søldarfirði er 19 ára arbeiðskona og á Toftum ársgomul smágenta.

5 *Anna Maria* eru allar yngri enn 14 ár.

1 *Anna Marthe* er 4 ára smágenta við Gøtugjógv.

13 *Anna Sophia* eru í øllum sóknum, men eingin eldri enn 34 ár.

4 *Barb(r)a* eru 47—58 ára konur í Oyndarfirði, á Nesi, við Gjógv og á Strondum.

1 *Barba Maria* er 32 ára kona í Norðragøtu.

6 *Bille.* Elstar eru 72 ára einkja á Toftum og 66 ára kona við Sjógv. Tvær 31—36 ára húsmøður eru ávikavist á

Eiði og í Syðrugøtu, og tvær 2—6 ára smágentur eru í Syðrugøtu og í Elduvík.

2 *Bille Katrine* eru 30 ára matmóðir við Sjógv og 4 ára genta á Nesi.

12 *Birgithe* eru í øllum sóknum uttan Fuglafjarðar sókn. Aldur: 2—78 ár.

1 *Birgithe Sophia* er 7 ára genta í Fuglafirði.

1 *Charlotta Margrethe Amalia* er 24 ára próstakona á Nesi.

2 *Christiane* eru 16 ára arbeiðskona á Skála og 3 ára bóndadóttir á Glyvrum.

1 *Christiana Sophia* er ársgamalt barn á Selatrað.

5 *Christine* eru 23—60 ára kvinnur í Syðrugøtu, Oyndarfirði (2), á Toftum og á Skála. Sí eisini Kirstine og C. og K. í samansettum nøvnum.

1 *Christine Maria* er 24 ára systkinabarn próstakonu á Nesi.

5 *Dorothea* eru 14—71 ára kvinnur í Leirvík (3), í Elduvík og í Oyndarfirði.

1 *Dorthea Sophie* er 10 ára bóndadóttir í Elduvík.

*Elisabeth* finst bara í samansetingum. Sí Lisbeth.

1 *Elisabeth Katrine* er 35 ára ógift arbeiðskona við Gjógv.

1 *Elisabeth Maria* er 18 ára bóndadóttir við Gjógv.

8 *Ellen* eru fýra 34—80 ára konur á Glyvrum, í Søldarfirði, á Toftum og í Elduvík og fýra 8—18 ára ungdómar í somu sóknum.

3 *Ellen Katrine* eru 22 ára kona á Toftum og tvær 3—6 ára bóndadøtur í Lamba og í Fuglafirði.

3 *Ellen Maria,* 6, 45 og 60 ár, eru allar á Toftum.

1 *Ellen Sophie* er 11 ára bóndadóttir í Elduvík.

3 *Else* eru 83 ára sorinskrivaraeinkja og 14 ára sýslumansdóttir í Søldarfirði og 4 ára bóndadóttir í Lamba. Sí eisini Elsebeth.

59 *Elsebeth* eru í øllum sóknum og í øllum aldri, og har aftrat eru 12, ið hava E. sum fyrra ella seinna navn av tveimum fornøvnum.

1 *Elsebeth Helena* er 9 ára bóndadóttir á Oyri.

1 *Elsebeth Katrine* er 2 ára fiskimansdóttir við Gjógv.

3 *Elsebeth Malene* eru 10—13 ára óvitar á Glyvrum, á Toftum og við Gjógv.
1 *Elsebeth Margrethe* er 21 ára genta í Norðragøtu.
3 *Elsebeth Maria* eru 43 ára ógift sorinskrivaradóttir í Søldarfirði, 27 ára ógift húshaldskona við Gjógv og 2 ára húsmansdóttir á Skála.
2 *Elsebeth Sophia* eru 35 ára bóndakona í Sevlendi og 13 ára bóndadóttir á Eiði.
1 *Femia* er 40 ára matmóðir á Eiði.
*Fridericha* finst bara í samanseting Sophia F.
1 *Gurendt Christine* er 12 ára bóndadóttir á Eiði.
1 *Helena* er 17 ára fosturdóttir Onnu Katrinu Wang á Selatrað. Sí eisini Elsebeth H.
1 *Hendriche Christiane* er 10 ára sýslumansdóttir í Søldarfirði.
1 *Ingeborg* er 50 ára matmóðir í Gerðum.
2 *Inger* eru 27 ára ógift húsmansdóttir í Norðragøtu og 11 ára bóndadóttir við Gjógv. Eisini hava tvær I. sum fremra navn av tveimum fornøvnum.
1 *Inger Anna* er 15 ára genta á Eiði.
1 *Inger Katrine* er 18 ára genta á Nesi.
5 *Johanna* eru tvær á Glyvrum, ein á Selatrað, ein á Eiði og ein í Funningi. Henda seinasta er skrivað Johane Poulsen. Aldur: 1—44 ár.
1 *Johanna Maria* er 13 ára bóndadóttir á Toftum.
7 *Julianna* eru tvær 63—65 ára einkjur í Leirvík og á Nesi, ein 39 ára kona á Selatrað og fýra 2—10 ára børn í somu sóknum.
1 *Karen* er 24 ára ógift arbeiðskona hjá sorinskrivaraeinkjuni í Søldarfirði.
1 *Karen Margrethe* er 7 ára bóndadóttir í Lamba.
42 *Katrine* eru í øllum sóknum og í øllum aldri. Har aftrat eru 26, ið hava K. sum fyrra ella seinna navn av tveimum fornøvnum, og onnur teirra, sum í Eysturoyar sýslu bera trý fornøvn, hevur K. sum mittasta fornavn.
1 *Katrine Elsebeth* er 85 ára móðir bóndans á Oyri.

2 *Katrine Malene* eru 14—16 ára gentur á Selatrað og á Eiði.

2 *Kirstine* eru 35 ára kona á Eiði og 5 ára genta á Skála. Henda seinna er skrivað Kristine. Sí eisini Christine.

1 *Kirstine Sophia* er 9 ára húsmansdóttir á Skála.

15 *Lisbeth* eru í øllum sóknum uttan í Eiðis og Gøtu sóknum. Aldur 6—80 ár. Sí eisini Anna Lisbeth og Elisabeth.

8 *Magga* eru í øllum sóknum uttan í Gøtu sókn. Flestar eru eldri konur. Undantøk eru 24 ára ógift arbeiðskona á Nesi og 6 ára fosturdóttir eldri Møggu í Leirvík.

51 *Malene* eru í øllum sóknum og í øllum aldri, og har aftrat eru 10, ið hava M. sum seinna navn av tveimum fornøvnum.

62 *Maren* eru í øllum bygdum uttan á Nesi og á Oyri, og har aftrat eru tríggjar, ið hava M. sum tað fremra av tveimum fornøvnum.

1 *Maren Christine* er 21 ára ógift fosturdóttir Jógvans bónda í Oyndarfirði.

2 *Maren Sophia* eru 20 ára kona í Norðragøtu og 15 ára arbeiðskona við Gjógv.

2 *Margrethe* eru 11—32 ára bóndadøtur ávikavist í Elduvík og í Fuglafirði. Eisini hava 6 M. sum seinna navn av tveimum og 1 hevur M. sum mittasta av trimum fornøvnum.

4 *Maria.* Elst er 65 ára Maria Hansdatter f. Rønning á Nesi. Hinar eru 1—12 ára smágentur við Sjógv og á Eiði, og síðan eru 19, ið hava M. sum annað av tveimum fornøvnum.

1 *Maria Kirstine* Brun er 56 ára bóndakona við Sjógv.

1 *Maria Magdalene* Reinert f. Hanssen er 61 ára vermóðir próst á Nesi.

2 *Mariane* eru 35 ára kona og 10 ára genta, báðar á Skála.

1 *Marthe* er 57 ára bóndakona við Gøtugjógv. Sí eisini Anna M.

8 *Rachel* eru í øllum sóknum uttan í Funnings og Sjóvar sóknum. Aldur: 11—58 ár.

1 *Ragnhild* er 59 ára bóndakona í Leirvík.

4 *Sara* eru 79 ára bóndamóðir á Toftum, 51 ára bóndakona og 7 ára barn í Norðragøtu og 3 ára barn í Leirvík.

2 *Sara Maria* eru 15 ára genta á Toftum og 8 ára barn í Gerðum.

1 *Sara Sophia* er 27 ára kvinna í Fuglafirði.

2 *Sidsel* eru 64 ára kona í Funningi og 4 ára barn á Skála. Sí eisini Zidsel.

8 *Sigge* eru í øllum sóknum uttan í Oyndarfjarðar og Nes sóknum. Aldur: 21—90 ár. Sí eisini Zigge.

2 *Sigge Sophia* eru 49 ára bóndakona í Elduvík og 18 ára bóndadóttir í Funningi.

1 *Sisillia* er 40 ára bóndakona í Fuglafirði.

8 *Sophia* eru í øllum sóknum uttan í Fuglafjarðar og Gøtu sóknum. Aldur: 1—46 ár. Har aftrat eru 28, ið hava S. sum annað av tveimum fornøvnum.

1 *Sophia Christiana* f. Diurhuus er 62 ára bóndakona á Glyvrum.

1 *Sophia Fridericha* Knudsdatter er 6 ára bóndadóttir á Eiði.

1 *Sophia Katrine* er 8 ára genta á Selatrað.

29 *Sunneva* eru í øllum sóknum uttan í Gøtu sókn. Aldur: 3—89 ár.

42 *Susanna* eru í øllum sóknum og í øllum aldri. Har aftrat eru 3, ið hava S. sum annað av tveimum fornøvnum, og ein hevur S. sum tað seinasta av trimum fornøvnum.

2 *Susanna Malene* eru 19 ára kona í Funningi og 4 ára barn á Nesi.

5 *Zidsel* eru tvær í Norðragøtu, ein á Skála, ein á Eiði og ein í Fuglafirði. Aldur: 16—67 ár. Sí eisini Sidsel.

6 *Zigge* eru fýra í Fuglafirði, ein í Norðragøtu og ein við Sjógv. Aldur: 1—72 ár. Sí eisini Sigge.

605 kvinnur í Eysturoyar sýslu 1801

## *Mannanøvn í Eysturoyar sýslu 1801*

1 *Aarandt* er 32 ára giftur bóndasonur í Leirvík.

5 *Abraham* eru 91 ára húsmaður á Skála, 60 ára einkjumaður í Gerðum og tríggir 1—10 ára dreingir í Funningi, á Skála og í Oyndarfirði.

10 *Anders* eru tveir 60 ára bøndur við Sjógv og í Gørðum, ein 65 ára húsmaður í Norðragøtu, 54 ára óðalsmaður við Gjógv, 43 ára húskallur á Selatrað og 34 ára bønarmaður í Gerðum. Hinir fýra eru 8—22 ára dreingir í Sevlendi, á Selatrað, í Syðrugøtu og á Eiði.

2 *Andreas* eru 60 ára prósturin á Nesi og 15 ára sonur hansara.

6 *Andres* eru 52—68 ára óðalsmenn í Elduvík, í Funningi og við Gjógv. Hinir yngru, 3—24 ár, eru í somu sóknum.

5 *Antonius* eru 55 ára bóndi og 18 ára bóndasonur í Oyndarfirði, 53—55 ára húskallar í Syðrugøtu og í Lamba og ein 30 ára óðalsmaður á Skála.

5 *Augustinus* eru tveir 16—33 ára bóndasynir í Oyndarfirði, tveir 12—24 ára dreingir í Gerðum og ein 4 ára bóndasonur í Norðragøtu.

3 *Berendt* eru 79 ára bóndi á Eiði, 43 ára jarnsmiður í Sevlendi og 11 ára timburmans sonur í Gerðum.

2 *Bertel* eru 75 ára bønarmaður við »lit LeyeJord« og 6 ára abbasonur í sama húsi í Gerðum.

2 *Christen* eru 25 ára bóndasonur á Glyvrum og 25 ára handverksmaður á Selatrað. Helst eru teir systkinabørn.

7 *Christian* eru tveir við Gjógv, ein á Eiði, ein við Norðskála, ein á Skála og tveir í Nes sókn, ávikavist á Glyvrum og á Toftum. Aldur: 16—62 ár. Har aftrat eru fýra, ið hava C. sum seinna navn av tveimum fornøvnum.

1 *Claus* er 6 ára bóndasonur á Glyvrum.

2 *Clemend* eru 34 ára bóndi í Lamba og 15 ára húskallur á Selatrað.

1 *Cornelius Christian* Reinert er 19 ára svágur próst á Nesi.

14 *Daniel* eru í øllum sóknum og í øllum aldri.

2 *David,* báðir á Eiði, 13 og 44 ár.

1 *Dione* er 40 ára giftur ognarleysur á Eiði.
10 *Elias* eru allir á Eystursíðuni (Gøtu, Leirvík, Fuglafirði, Elduvík) uttan ein giftur maður á Eiði. Aldur: 3—82 ár.
2 *Erich* eru 37 ára bóndi í Leirvík og 28 ára húskallur á Eiði.
2 *Eyden* eru 85 ára haldbóndi í Syðrugøtu og 7 ára bóndasonur í Norðragøtu.
1 *Frederich* er 20 ára drongur í Gerðum.
2 *Gabriel* eru 76 ára húsbóndi og 10 ára fostursonur, báðir í sama húsi í Leirvík.
5 *Gregers* eru 76 ára maður og 9 ára fostursonur, báðir í sama húsi á Eiði, ein 15 ára húskallur á Eiði, 42 ára maður og 40 ára drongur, báðir í Syðrugøtu.
1 *Guttorm* er 46 ára húskallur við Sjógv.
1 *Haldan* er 6 ára bóndasonur á Lambagarði.
37 *Hans* eru í øllum sóknum og í øllum aldri.
1 *Hans Peder* er 19 ára sýslumanssonur í Søldarfirði.
1 *Hans Poul* er 3 ára sonur óðalsmans á Skála.
1 *Harald* er 53 ára sáttardómari, bátasmiður v.m. í Oyndarfirði.
13 *Hejne* eru í øllum sóknum uttan í Sjóvar sókn og Nes sókn. Aldur: 2—79 ár.
*Hendrich* finst bara í samanseting Johan H.
8 *Høgne* eru allir á Eystursíðuni: 2 í Elduvík, 3 í Oyndarfirði og ein í hvørjari av bygdunum Fuglafirði, Leirvík og við Gøtugjógv. Aldur: 3—70 ár.
11 *Isak* eru í øllum sóknum uttan í Sjóvar sókn og Nes sókn. Aldur: 3—84 ár.
55 *Jacob* eru í øllum sóknum og í øllum aldri. Sí eisini Ole J., Samuel J. og J. Peder.
1 *Jacob Peder* er 31 ára húskallur í Oyndarfirði.
3 *Jens,* allir í Nes sókn, og allir yngri enn 26 ár.
2 *Jeremias* eru báðir í Fuglafirði, 34 og 51 ár. Sí eisini Johannes J.
3 *Johan* á Eiði, við Sjógv og á Skála. Allir yngri enn 10 ár.
1 *Johan Christian,* 61 ára bókhaldari fyri Argja hospital, býr á Nesi.

1 *Johan Hendrich* er 15 ára sýslumanssonur í Søldarfirði.
34 *Johannes* eru í øllum sóknum og í øllum aldri.
1 *Johannes Jeremias* er 18 ára bóndasonur í Elduvík.
1 *Johannes Olavius* er 13 ára prestasonur á Nesi.
121 *John* er vanligasta mansnavn í Eysturoyar sýslu 1801 og finst allastaðni uttan í Gørðum og við Gøtugjógv.
1 *John Christian* er 13 ára húskallur við Gjógv.
1 *Justi* er 48 ára bóndi í Leirvík.
1 *Justinus* er 37 ára húsmaður á Toftum.
1 *Knud* er 57 ára bóndi á Eiði.
1 *Lauritz* er 8 ára bóndasonur í Fuglafirði.
1 *Lucas* er 38 ára bønarmaður í Fuglafirði.
1 *Lyder* er 16 ára óskilgitin drongur á Toftum.
9 *Magnus* eru tveir 36—46 ára menn og 14 ára drongur á Skála, tveir 10—27 ára dreingir í Nes sókn, ein 20 ára drongur í Gerðum, tveir 7—15 ára dreingir ávikavist í Norðragøtu og í Fuglafirði og ein 62 ára uppgávumaður á Eiði.
9 *Michel* eru í øllum sóknum uttan í Funnings sókn. Aldur: 8—76 ár.
1 *Morten* er 47 ára óðalsmaður og uppsitari á Toftum.
10 *Niclas* eru 4 á Skála, 2 í Fuglafirði, ein í Elduvík, ein á Selatrað, ein í Sevlendi og ein á Toftum. Aldur: 2—78 ár.
2 *Nicolai* eru 14—21 ára dreingir ávikavist við Gjógv og á Skála.
1 *Nicolai Peder* er 15 ára húskallur í Oyndarfirði.
5 *Niels* eru tveir 56—66 ára bøndur á Glyvrum, tveir 18—67 dreingir á Skála og ein 10 ára óskilgitin drongur á Eiði.
51 *Ole* eru í øllum sóknum og í øllum aldri.
1 *Ole Christian* er 2 ára bóndasonur á Toftum.
1 *Ole Hans* er 6 ára abbasonur uppsitarans á prestagarðinum á Nesi.
2 *Ole Jacob* eru 3 og 9 ára dreingir ávikavist við Gjógv og á Selatrað.
1 *Oluf* er 29 ára dótturmaður bóndans við Gøtugjógv.

33 *Peder* eru í øllum sóknum og í øllum aldri. Sí eisini Hans P., Jacob P., Nicolai P. og Thomas P.

36 *Poul* eru í øllum sóknum uttan Nes sókn. Aldur: 5—79 ár. Sí eisini Hans P. og P. Andreas.

1 *Poul Andreas* er 30 ára húskallur í Oyndarfirði.

10 *Rasmus* eru í øllum sóknum uttan í Eiðis sókn og í Oyndarfjarðar sókn. Aldur: 1—62 ár.

3 *Sacharias* eru allir eldri enn 36 ár og búgva í Fuglafirði, í Norðragøtu og á Selatrað.

1 *Samuel* er 6 ára drongur í Selvindi.

3 *Samuel Jacob* eru helst allir skyldmenn og búgva á Lambagarði og í Søldarfirði. Aldur: 6, 8 og 27 ár.

7 *Sigvardt* eru tríggir á Toftum, tríggir í Fuglafirði og ein í Leirvík. Aldur: 1—67 ár.

8 *Simon* eru í øllum sóknum uttan í Eiðis og Funnings sóknum. Aldur: 3—64 ár.

1 *Siver* er 30 ára húskallur í Oyndarfirði.

2 *Søren* eru 65 ára húsmaður á Toftum og 2 ára húsmanssonur í Søldarfirði.

10 *Thomas* eru í øllum sóknum uttan í Eiðis og Oyndarfjarðar sóknum. Aldur: 2—63 ár.

1 *Thomas Peder* er 5 ára bóndasonur á Toftum.

1 *Torle* er 78 ára óðalsmaður í Funningi.

4 *Trond* eru 82 ára olmussumaður og 2 ára smádrongur í Fuglafirði, 61 ára bóndi í Syðrugøtu og 62 ára gamal drongur í Sevlendi.

609 menn í Eysturoyar sýslu 1801

## *Eftirnøvn í Eysturoyar sýslu 1801*

10 *Abrahams-* eru í somu sóknum sum A.-fornavnið, tó ikki í Funningi, men í Gøtu. Aldur: 13—48 ár.

16 *Anders-* eru í somu sóknum sum A.-fornavnið og har aftrat í Lamba, í Leirvík og í Oyndarfirði. Aldur: 1—101 ár.

5 *Andre(a)s-* eru, eins og fornavnið, í Funningi, við Gjógv og í Elduvík, og har aftrat í Oyndarfirði. Aldur: 14—64 ár.

8 *Antonis-* eru í Oyndarfirði, í Elduvík, á Skála og við Sjógv. Aldur: 2—55 ár.

14 *A(u)gustinus-* eru í Oyndarfirði, í Fuglafirði, í Leirvík, í Gerðum og á Selatrað. Aldur: 1—74 ár. Teir í Oyndarfirði eru skrivaðir Agustinus.

5 *Berendts-* eru í Sevlendi og í Gerðum og har aftrat á Toftum. Aldur: 3—48 ár.

4 *Bertels-* eru í Gerðum, eins og fornavnið, og har aftrat í Fuglafirði, í Elduvík og við Gjógv. Aldur: 34—72 ár.

1 *Birgers-* er 67 ára húsmaður á Selatrað. Birgir er ikki til sum fornavn í Eysturoyar sýslu 1801. Sí eisini Byrges-.

1 *Brun* er 56 ára Maria Kirstine, bóndakona við Sjógv.

1 *Byrges-* er 60 ára ognarleysur maður í Oyndarfirði, men, sum ávíst, finst Birgir ikki sum fornavn í Eysturoyar sýslu 1801. Sí Birgers-.

19 *Christians-* eru í somu sóknum sum C.-fornavnið. Aldur: 2—62 ár.

